# Televarpið hevur ongantíð ætlað at senda porno

**Tróndur Djurhuus, stjóri á Televarpinum, harmast um nógvu skeivu umrøðuna Televarpið hevur fingið, í sambandi við spurningin, hvørt tað fer at senda porno ella ikki**

TELEVARP
*Ingrid Bjarnastein*

Útvarpið gjørdi mánakvøldið greitt, at sambært fútanum, sleppur Televarpið ikki at senda porno, tí hetta er í stríð við lógina.

– Tað er satt at siga spell, mátin sum útvarpið sigur tað upp á. Vit hava ongantíð ætlað okkum at sent porno, men útvarpið fær tað at ljóða sum um vit alla tíðina hava ætlað at sent porno, og tí bróta vit lógina um vit gera tað, sigur Tróndur Djurhuus, stjóri á Televarpinum við Sosialin.

Tróndur Djurhuus ger greitt, at Televarpið hevur alla tíðina verið kunnað um, at tað er ólógligt senda porno í Føroyum.

– Tveir innanhýsis løgfrøðingar her á Føroya Tele, hava fyri fleiri mánaðum síðani staðfest, at tað er ólógligt at senda porno. Tí spurdu vit Mentamálaráðið um tað gjørdi nakað, um vit sløktu teir tímarnar pornofilmarnir vórðu sendir, tí vit hava ikki loyvi at sløkkja nakrar sjónvarpsrásir sambært kringvarpslógini, greiðir Tróndur Djurhuus frá.

Ikki fyrr enn Sosialurin skrivaði, at fútin ikki visti, um tað var ólógligt ella ikki, gjørdist »pornospurningurin« aftur eitt mál fyri Televarpið, sum tó tá langt síðani hevði avgjørt als ikki at senda porno.

Men nú er so staðfest av teimum báðum innanhýsis løgfrøðingunum, tveimum óheftum advokatum og av fútanum, at um pornofilmar verða sendir, so er tað í stríð við grein 234 í revsilógini.

– Hesir løgfrøðingarnir og fútin hava ikki gjørt annað enn at staðfesta tað, sum væntaðu fyri fleiri mánaðum síðani.


*Enn er dagurin ikki fastlagdur nær Televarpið fer at senda, men Tróndur Djurhuus, stjóri á Televarpinum, lovar, at tað verður væl innan jól*

## Áðrenn jól

Útvarpið gjørdi somuleiðis greitt, at Televarpið fór at senda einaferð áðrenn nýggjár. Hetta er rætt, men heldur Tróndur Djurhuus, at hetta ljóðar sum um Televarpið fer at senda einaferð ímillum jól og nýggjárs.

– Vit hava alla tíðina sagt, at vit verða tekniskt klár tann 25. november. Men vit rokna ikki við at senda júst tann dagin. Í løtuni taka vit støðu til, um vit skulu útseta tað í nakrar dagar, sigur stjórin á Televarpinum.

Tórshavnar Býráð eigur framvegis Rás Tórshavn, og endalig avtala skal eisini gerast við teir um nær rásin skal sløkkjast.

– Harumframt hava vit eisini nakrar innahýsis grundir til, at tað riggar betri at bíða í nakrar dagar. Men tað verður væl áðrenn jól, at tað verður klárt, men sjálvur dagurin er ikki ásettur enn.

Prísurin er heldur ikki fastlagdur enn. Enn vantar ein endalig avtala við KODA um avgjøld, og Televarpið er framvegis í samráðingum við DR um tær báðar rásirnar frá teimum.






# Óvist, hvussu stóran skaða nýggja ferjulegan fekk

**Pihl&Søn, ið stendur fyri arbeiðinum at gera nýggju ferjuleguna til Norrønu, hevur enn ikki fingið greiðu á, hvussu umfatandi skaða arbeiðið fekk í illveðrinum sunnunáttina. Fyritøkan arbeiðir tó framvegis ímóti at fáa arbeiðið liðugt til ásettu tiðina.**

HAVNABYGGING
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Enn er ikki greitt, hvussu stóran skaða arbeiðið við at gera nýggju ferjuleguna til Norrønu á Bursatanga í Havn fekk í illveðrinum um vikuskiftið. Menn frá Pihl&Søn, ið stendur fyri arbeiðinum, hava verið og kannað viðurskiftini, men enn finst einki yvirlit yvir skaðan, ella um hann fer at seinka arbeiðinum.

Jan Hoffman, sum er leiðari, ella projekt-koordinator, fyri øllum arbeiðum hjá Pihl&Søn í Føroyum, sigur, at enn er ov tíðliga at meta um skaðan.


*Pihl&Søn hevur enn ikki fingið yvirlit yvir, hvussu umfatandi skaða arbeiðið við nýggju ferjuleguni til Norrønu fekk í illveðrinum sunnunáttina og um arbeiðið verður seinkað av hesi orsøk. Nýggja ferjulegan skal vera liðug 20. mars næsta ár*

– Fólk hjá okkum hava hugt at skaðanum, men enn hava vit ikki gjørt nakrar meting av, hvørjar avleiðingar skaðin hevur fyri samlaða arbeiðið, sigur Jan Hoffman. Hann leggur afturat, at tíðindini um at arbeiðið møguliga verður seinkað í fleiri mánaðir, eru reinar gitingar.

– Vit hava onki yvirlit yvir skaðan enn, og tí ber ikki til at siga, um arbeiðið verður seinkað. Vit arbeiða tó framvegis ímóti at ferjulegan skal kunna takast í nýtslu sum avtalað, tann 20. mars næsta ár, sigur Jan Hoffman.

Leiðslan í Pihl&Søn skuldi á fund um málið seinnapartin týsdagin, eftir at blaðið var farið til prentingar. Og tá væntaði Jan Hoffman eisini at fáa eina frágreiðing um, hvussu umfatandi skaðin er.

## Kann koma illa við

Jákup Suni Joensen, formaður í Havnanevndini hjá Tórshavnar Býráð, sigur, at skaðin á arbeiðið at gera nýggju ferjuleguna ikki er eitt mál fyri Havnanevndina, í øllum føri ikki í fyrstu atløgu.

– Vit hava eina avtalu um, at ferjulegan skal vera liðug 20. mars næsta ár. Vísir tað seg, at tíðarætlanin verður seinkað av óhappinum sunnudagin, so hava vit ein trupulleika, og tá má málið takast upp politiskt, sigur Jákup Suni Joensen.

Formaðurin í Havnanevndini sigur, at tað kemur sera illa við hjá Tórshavnar Havn, skuldi tað víst seg, at arbeiðið verður nógv seinkað. Nýggja Norrøna er so mikið stór, at einasta staðið, hon kann liggja, meðan ferðafólk og bilar fara í land og um borð, er við ferjuleguna, ið nú verður gjørd.

Tórshavnar Havn hevur higartil brúkt umleið 10 milliónir krónur til uppíbygging og styrking av verandi kai, og tá nýggja ferjulegan og rampan er gjørd inni í krókinum við Bursatanga, er kostnaðurin komin uppá umleið 30 milliónir krónur. Ein ætlan er gjørd, ið ber í sær, at nýggi Smyril kann liggja uttanfyri rampuna til Norrønu, men fyribils er gongd ikki komin á hesa ætlan, ið sostatt ikki er íroknað tær 30 milliónirnar. Ætlanin bíðar framvegis eftir, hvør skal gjalda fyri atløguplássið hjá nýggja Suðuroyarskipinum – Tórshavnar Kommuna, landið, ella báðir partar í felag.

Í næstum verður eisini farið undir at taka niður bygningin hjá Strandferðsluni á bryggjuni. Umleið tveir triðingar av bygninginum skal burtur, so bara sjálv Farstøðin stendur eftir. Eisini skal byggjast eitt 16 metra høgt móttøkutorn og ein gongubrúgv til ferðafólk við Norrønu. Upprunaliga var ætlanin, at Tórshavnar Havn, Smyril Line og Strandferðslan skuldu eiga henda bygning í felag, men nú avtornar verður Tórshavnar Havn einsamallur eigari. Kostnaðurin av móttøkutorninum, gongubrúnni og øðrum í hesum sambandi er mettur til góðar 17 milliónir krónur.

# Postverkið framvegis í leysari luft

**Samgongan er samd um at arbeiða víðari við at tillaga virksemið hjá Postverkinum, so tað er í samsvar við uppskotið til fíggjarlóg. Tað vil siga, at eingir pengar skulu játtast Postverkinum næsta ár, hóast stovnurin hevur tørv á átta milliónum krónum. Eftir landsstýrisfundin týsdagin kundi Bjarni Djurholm tó staðfesta, at semjan tó ikki røkkur longur enn at arbeiðast skal víðari við málinum**

POSTVERKIÐ
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Postverk Føroya manglar framvegis átta milliónir krónur fyri at roknistykkið í fíggjarætlanini hjá stovninum næsta ár skal ganga upp. Hetta eru pengarnir, sum Vinnumálaráðið játtaði stovninum í fíggjarlógaruppskotinum, men sum síðan vóru strikaðir aftur úti í Fíggjarmálaráðnum.


*Samgongan er samd um at arbeiða víðari við at tillaga virksemið hjá Postverkinum, so tað er í samsvar við fíggjarlógaruppskotið, tvs. at eingir pengar vera játtaðir stovninum næsta ár. Men á landsstýrisfundinum týsdagin kundi Bjarni Djurholm tó ikki fáa grønt ljós fyri síni ætlan at umskipa Postverkið til alment partafelag, og tí er framvegis óvist, hvar Postverkið skal finna tær átta milliónirnar, sum mangla í á fíggjarætlanini hjá stovninum fyri næsta ár*

Málið um Postverk Føroya var fyri á landsstýrisfundi týsdagin. Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, sum eisini varir av Postverkinum, hevur í eina tíð arbeitt við at umskipa Postverkið til alment partafelag. Herfyri fór ætlanin hjá landsstýrismanninum út til hoyringar hjá hinum samgonguflokkunum, sum síðan skuldu gera sínar viðmerkingar til málið. Landsstýrismaðurin hevur víst á, at við at umskipa Postverkið til alment partafelag ber til at gera Postverkið leyst av árligu játtanini á fíggjarlógini. Startkapitalurin til umskipanina skal koma við at selja bygningin hjá Frímerkjadeildini á Argjun. Men eftir landsstýrisfundin týsdagin er sumt, sum bendir á, at semjan í samgonguni um framtíðina hjá Postverkinum bara røkkur til at stovnurin skal ikki hava nakra játtan á fíggjarlógini.

Bjarni Djurholm sigur, at samgongan er samd um at arbeiða víðari við at tillaga virksemið hjá Postverkinum, so tað er í samsvar við fíggjarlógaruppskotið. Tað vil við øðrum orðum siga, at Postverkið skal ikki hava nakra játtan á fíggjarlógini fyri næsta ár. Men Bjarni Djurholm fekk tó ikki grønt ljós frá hinum samgongufIokkunum til at fara undir at umskipa Postverkið til alment partafelag. Tó hevur hann vónir um at ein loysn verður funnin fyri Postverkið.

– Afturmeldingarnar, ið eg fekk frá hinum samgonguflokkunum, vóru sum heild positivar. Tað er semja um at arbeiða víðari við málinum, sum er at Postverkið skal vera óheft av fíggjarlógini, sigur Bjarni Djurholm. Hann leggur afturat, at ber ikki til at semjast í samgonguni um eina loysn fyri Postverkið, so verður tað uppgávan hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum at seta tær átta milliónirnar, ið Fíggjarmálaráðið strikaði, á aftur fíggjarlógina fyri næsta ár.

– Hóast Vinnumálaráðið arbeiðir við at umskipa Postverkið til alment partafelag, og at tað tí væntandi ikki fór at vera neyðugt við hesi játtan næsta ár, so valdi eg at játta peningin til Postverkið kortini. Hetta fyri at skapa tryggleika á stovninum, skuldu trupulleikar stungið seg upp í samband við umskipanina. Men síðan valdi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum at strika peningin, og tí vænti eg eisini, at hann setur peningin aftur á fíggjarlógina, røkka vit ikki málinum at umskipa Postverkið, sigur Bjarni Djurholm.

Bjarni Djurholm hevur fleiri ferðir ført fram, at skal Postverkið hava møguleika at menna seg og annars virka og kappast á marknaðinum, er neyðugt at umskipa stovnin til alment partafelag. Vinnumálaráðið arbeiðir í løtuni við at fyrireika neyðugu lógarbroytingarnar, so stovnurin kann umskipast til alment partafelag. Harumframt eru nógv starvsfólkaviðurskifti, ið skulu fáast uppá pláss.

Í seinastuni hevur verið upp á tal, at Postverkið skal selja bygningin á Argjum, og eitt nú hevur Tórshavnar Býráð sýnt bygninginum stóran áhuga. Bjarni Djurholm hevur í hesum sambandi gjørt púra greitt, at talan verður ikki um at selja bygningin, fyri síðan at nýta tær 30-40 milliónirnar, ið bygningurin er virðismettur til, til vanliga raksturin hjá stovninum. Skal bygningurin seljast, so hevur landsstýrismaðurin tryggjað sær, at sølan verður framd í samsvar við umskipanina av Postverkinum til alment partafelag.